# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tey góðu umboðini

Føroysk ítróttarfólk, føroysk listafólk og føroyskir granskarar gerast alt meira kend uttan fyri landoddarnar. Ítróttarfólk og telvarar koma aftur av einari altjóða stevnu fyri og aðrari eftir við heiðursmerkjum og framúrskarandi ítróttarligum avrikum. Vit gleðast øll við teimum og kenna tað, sum vit eiga eitt sindur í teimum, tá tey koma aftur av sigursferðum. Tá ið illa gongst í hond harmast vit og vóna, at betur verður næstu ferð. Vit fegnast um, at tey hava tikið lut og hava víst flagg okkara uttanlands.

Føroysk listafólk tað veri seg innan tónlist, leiklist, filmslist, málningalist ella skaldskap, hava stóra eydnu við yrkisleiðum sínum uttanlands. Tey fáa virðislønir, ella verða innstillað til viðirslønir, og tey fáa sera góða umtalu í útheiminum. Vit fylgja við og fegnast, tá tað gongst okkara listafólkum væl og vit hava eina kenslu av, at hetta kemur allari tjóðini til góða bæði á ein og annan hátt. Tey gera Føroyar kendar fyri dygd og kreativitet.

Umframt listafólk og ítróttarfólk eru føroyingar í hópatali í vinnu uttanlands. Teir flestu eru í Danmark ella í Norðurlondum, men alt fleiri eru í vinnu uttan fyri hetta landafrøðiliga øki. Føroyingar eru sera nógv eftirspurd arbeiðsmegi og er hetta tekin um dugnaskap, góðar viðkomandi útbúgvingar og álit.

Øll hesi, ítróttarfólk, listafólk og fólk í ymsum vinnum, eru okkara umboð uttanlands- tey góðu umboðini. Føroyar so at siga branda seg við hesum fólkum. Tey eru sera góðir ambassadørar ella sendifólk fyri føroysku tjóðina, eitt slag av óalmennum goodwill ambassadørum. Vit eiga at fara væl um hesi fólk og eiga at vera teimum takksom fyri teirra týdningarmikla leiklut. Landsins myndugleikar eiga eisini at tryggja tilgongdina av slíkum fólkum. Hetta gerst við at styrkja og menna ítrótt, mentan og list eins væl og at menna og nútímansgera okkara yrkisligu útbúgvingar. Altjóðagerðin hevur latið alheiminum upp fyri ungum føroyingum. Verður rætt og skilagott borið at, kemur hesin møguleiki okkum øllum til góðar.

**Sosialurin**

## Tórshavnar kommuna vorðin ein sonn mjólkikúgv

**ANNIKA OLSEN**



býráðslimur
í Tórshavn

Uttan fyri Havnina verður oftani tikið til, at Tórshavnar kommuna er væl fyri; tað er har pengakassin flýtur yvir, tað er har fólkið er, tað er har, tann almenna fyrisitingin er, tað er har, tey almennu størvini eru o.s.fr. og tískil er tað skilagott at gjara út, flyta stovnar og arbeiðspláss til onnur øki í landinum, ið eru verri fyri. Tað sær út til, at alt tað, sum hendir í hesum landi, er stýrt av sokallaðari jantilóg, ið er so sterk, at landsins lógir onki kunnu stilla upp ímóti hesi simplu og gróðurfestu lóg. Alt, ið verður gjørt í Føroyum, verður stýrt eftir lægsta felagsnevnara. Vit kunnu taka okkara skúlaskipan, har støðið verður lagt eftir tí veikasta nemminginum í flokkinum, og tíverri sær tað út til, at man nú á hægsta støði eisini ynskir at føra kommunalan fíggjarpolitikk eftir lægsta felagsnevnara.

Tað er ein hugburður, ið er púra burturvið. Vit eiga ikki at pína tær kommunur, ið klára seg væl, fyri at onnur øki í Føroyum kunnu koma uppá føtur - tað er í hvørt fall ikki á henda hátt, at vit kunnu finnast millum 15 tær bestu tjóðir í 2015. Tað er í lagi, at vit styrkja um útjaðaran, men tað gerst ikki við mannagongdini, vit hava sæð í seinastuni við millum annað flytanini av Strandferðsluni. Tað er ómetaliga harmiligt, at okkara løgtingsumboð úr Suðurstreymi sita og sova, meðan alt verður flutt út Havnini, peningur eins væl og arbeiðspláss. Mær lystir at vita, hvat er hent við løgtingsfólkunum úr Suðurstreymi. Hvar er loyaliteturin og samkenslan fyri tykkara valdømi?

### Kommunala millumjavningarskipanin

Tað nýggjasta, vit hava hoyrt frá Tjóðveldisflokkinum, er uppskotið um sokallaða kommunala millumjavningarskipan. Grundgevingin fyri hesi skipan er, at skulu fleiri øki, eitt nú fólkaskúlin og eldraøkið leggjast út til kommunurnar at umsita, er einasta loysn at fáa eina útjavnan millum kommunurnar, soleiðis at kommunur við hægsta inntøkugrundarlagi pr. íbúgva skulu gjalda fyri kommunur við lægri inntøkugrundarlagi. Tað skal ikki nógv til at rokna út, at Tórshavnar kommuna, ið er best fyri fíggjarliga og hevur størsta inntøkugrundarlag pr. íbúgva kemur at rinda størsta kostnaðin av hesi kommunalu millumjavningarskipan. Eftir mínum tykki er hetta at gera smærru kommununum eina bjarnatænastu, og hetta kemur í hvørt fall ikki til at viðføra nakra sjálvbodna kommunala samanlegging - tvørturímóti. Tað kann tykjast ómøguligt hjá smærru kommununum at yvirtaka eitt nú fólkaskúlan, sum íalt kostar umleið 300 mill. kr. og harvið treytar eina stóra øking av kommunala skattaprosentinum við uml. 5-6 prosentum, sum man neyvan fær inn aftur frá landinum, og tí byrja smærri kommunurnar sjálvsagt at rópa um hjálp.

### Føroyar skulu býtast í 4 kommunur

Eftir mínum tykki er bert eitt at gera, og tað er at býta Føroyar í munandi størri øki, eitt nú 4 stórar kommunur, soleiðis at inntøkugrundarlagið pr. íbúgva í miðal hækkar fyri viðkomandi kommunur. Fyrst tá fáa vit javnbjóðis kapping og kommunur, ið eru fíggjarliga væl fyri at yvirtaka málsøki sum eitt nú fólkaskúlan. Ì føroysku kommununum sita alt ov nógvir høvdingar, ið ikki vilja leggja saman í størri eindir, og hetta er sera barnsligt og fíggjarliga óforsvarligt. Tað sær út til, at vit mugu gera sum íslendingar, ið vórðu noyddir at leggja málsøki út til kommunurnar, fyri at tær kundu finna útav at leggja saman. Kommunurnar kring landið, ið hava eitt lágt inntøkugrundarlag pr íbúgva fara neyvan at klára seg betur fíggjarliga við at fáa ein kekk sendandi hvørt ár. Hetta minnir eitt sindur um blokkstuðulin, sum Føroyar fáa sendandi úr Danmark, og at tað er Tjóðveldisflokkurin, ið rópar harðast um hetta útjavnan kann man bara undrast enn meira yvir.

Við at lata kommunurnar finna saman í størri eindir hava tær sjálvar møguleika fyri at loysa trupulleikarnar innanhýsis og harvið styrkja seg á ein sunnan búskaparligan hátt heldur enn at fáa kunstiga fíggjarliga innsprænging.

### Incitamentið fyri at klára seg væl hvørvur

Við einari millumkommunalari útjavningarskipan hava kommunurnar onki endamál fyri at klára seg gott fíggjarliga, tí aðrar kommunur taka jú um endan. Hinvegin hava sterku kommunurnar heldur ikki nakað incitament fyri at klára seg gott, um yvirskotið bert verður flutt út kommunukassanum til aðrar kommunur.

Sum býráðspolitikkari í Havn taki eg tí als ikki undir við útjavning. Eg haldi, at Tórshavnar kommuna longu hevur víst sín solidaritet við at taka fleiri smærri kommunur upp í Tórshavnar kommunu, her hugsi eg um bygdir og oyggjar, ið liggja kring Havnina, og hevur tí Tórshavnar kommuna longu framt eina kommunala millumjavning. Tað er uppá tíðina, at løgtingsumboð, ið eru vald fyri Suðurstreym vakna, áðrenn mjólkin undan kúnni er vorðin til tað reina vatn.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa ræ̈ttuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.